# BRANDING



## Strategisk marknaðarføring

## Sjónliggerð tína fyritøku ella stovn sum eitt BRAND

**ENDAMÁL:**
Sjónliggera tína fyritøku, sum eina merkisvøru - eitt brand.

At uppbyggja eina strategiska hugsan um hvussu tín fyritøka skal marknaðarføra seg

**INNIHALD MODUL 1:**
**Partur 1:**
MUNURIN MILLUM TRADITIONELLA MARKNAÐARFØRING OG BRANDING
**Partur 2:**
THE IDENTITY SYSTEM
**Partur 3:**
THE IDENTITY PRISM
**Partur 4:**
BRAND EQUITY MODEL

**INNIHALD MODUL 2:**
**Partur 1:**
BRAND IDENTITY, BRAND IDENTIY STRUCTURE og BRAND IDENTITY IMPLEMENTTATION SYSTEM
**Partur 2:**
A SERVICE-BRANDING MODEL for BRAND EQUITY
**Partur 3:**
BUILDING BRANDS
**Partur 4:**
BRANDBUILDING IMPERATIVES

**INNIHALD MODUL 3:**
**Partur 1:**
STRATEGIC BRAND ANALYSIS
**Partur 2:**
BRAND POSITION
**Partur 3:**
E-BRAND EQUITY MODEL
**Partur 4:**
BÓLKARNIR LEGGJA FRAM UPPSKOT TIL HVUSSU TEIRRA FYRITØKA SKAL BRANDA SEG

**UNDIRVÍSINGARHÁTTUR:**
Undirvísingin er í 12 pørtum, sum eru býttir upp í 3 modulir.
Hvørt modul hevur 4 partar á 4 tímar.
Undirvísingin skiftur millum frálæru og bólka-arbeiði.
Modul 3 endar við at luttakararnir gera eitt uppskot til hvussu teirra fyritøka skal branda seg

**MÁLBÓLKUR:**
- Stjórar
- Marknaðarføringsleiðarar
- Leiðarar generelt innan strategi og planlegging av fyritøkum og tænastuvørum

**KOSTNAÐUR:**
19.800 kr.

**TÍÐ:**
**MODUL 1:**
10/11+17/11+24/11+8/12
Kl. 8.15-12.15
**MODUL 2:**
12/1+19/1+26/1+9/2
Kl. 8.15-12.15
**MODUL 3:**
23/02+02/03+09/03+16/03
Kl. 8.15-12.15

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

**320 204 - kvasir@farodane.fo - www.kvasir.fo**

---



Á Stjórnardeildini eru 3 starvsfólk í fulltíðarstarvi og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, ger av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.a.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygd og virðing fyri einstaklinginum. Virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum

## Almannastovan søkir

# samskipara / skrivara

Vit sóknast eftir einum persóni við løgfrøðiligari ella aðrari samfelagsligari útbúgving frá hægri lærustovni ella einum persóni við sosialráðgevaútbúgving og royndum innan almannafyrisiting at samskipa arbeiðið við málum um fyritíðarpensjón.

Okkara ynski eru, at tú dugur at arbeiða sjálvstøðugt, hevur góð samstarvsevni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði.

Hevur tú hug at royna teg í einum livandi tvørfakligum og fjølbroyttum arbeiðsumhvørvi, har samskipan og samstarv við onnur starvsfólk hevur serligan týdning í arbeiðnum, er hetta nakað fyri teg.

Uppgávan verður at fyrireika mál um fyritíðarpensjón og tryggja, at tey eru væl lýst, áðrenn tey verða løgd fyri Pensjónsfundin, sum tekur avgerðir um tillutan av fyritíðarpensjón. Tú kemur at virka sum skrivari á pensjónsfundinum. Uppgávan kemur somuleiðis at umfata tilevnan og endurskoðan av leiðbeiningum, skipan av økinum o.t. Í tann mun tað er møguligt við atliti til høvuðsuppgávurnar, kemur tú at luttaka í øðrum arbeiði á stjórnardeildini.

Í arbeiðnum kemur tú at hava tætt samskifti og samarbeiði við tær deildir á stovninum, sum gera tilráðingar um tillutan av fyritíðarpensjón, herundir serliga arbeiðsmarknaðardeildina.

Tú verður sett/ur við tilvísing til leiðaran á stjórnardeildini á Almannastovuni.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara, ella Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á tel 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 30. oktober 2006, kl. 12.

Vinarliga merkið brævbjálvan:
"samskipari/skrivari"
og send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo